## Seinasta heilsan til
# Marthu Johansen,
## Klaksvík



Ógvuliga tungt var at fáa boðini um, at nú var Martha farin frá okkum. Vit vónaðu og vónaðu til tað síðsta, at Martha enn einaferð fór at reisa seg, men so var ikki. Sjúkan vann, og Martha slapp burtur frá allari pínu.

Men sorgin og saknurin er ómetaligur stórur. Martha var ein sólstrála. Hon lýsti upp, har hon var. Altíð glað og blíð við øll. Minnini eru so mong og góð, og tey vil eg altíð goyma í hjartanum. Vit spældu saman frá tí vit vóru lítlar smágentur, og vóru nærum dagliga saman allan uppvøksturin.

Tá vit møttust seinnu árini, elskaðu vit at práta og flenna saman,og ofta kom prátið inn á gamlar dagar. Sjálvt um eg havi búð niðri seinastu nógvu árini, føldi eg ongantíð, at langt var okkara millum. Vit tosaðu ofta í telefon saman, og hon dugdi serliga væl at fortelja frá, og fáa meg at føla at eg ikki forsømdi nakað, sjálvt um avstandurin var langur.

Tá vit komu heim at ferðast saman við børnunum, hevdi Ternan ikki meira enn lagt at bryggju, so var Martha í telefonini og ynskti okkum vælkomnum heim. Altíð gleddu vit okkum til at koma út at vitja, og nógvar góðar og hugnaligar løtur høvdu vit saman við tær og Egil. Børnini elskaðu eisini at vitja Marthu. Tað var nakað heilt serligt. Martha var so góð við børnini og tey við hana.

Góða Ingrid, Jákup Eli, Marnar og Gerd við familjum tykkara. Eg hugsi eisini um tykkum, sum hava mist eina elskaða dóttir og systir. Góði Egil! Ringt er at seta orð á, hvat tú hevur mist. Tú hevur mist hana, tú elskaði allarmest her á jørð. Vit hava teg ofta í tonkunum.

Friður verið við minninum um vinkonu mína, Marthu.

**Oddbjørg**

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum at okkara elskaði maður, pápi, verfaðir og abbi

**Leivur Elias Joensen**

Oyri

andaðist í heiminum mánadagin 9. desember, 59 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr heiminum í kirkjuna hósdagin 12. desember kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*

**Knúdina, Anna, Jóannis, Sámal, Maria og Elias**

Tey, ið vilja minnast Leiv kunnu lata eina gávu til Føroya Felag móti Krabbameini. Konto í peningastovnunum.

---



# Kjartan Dalsgaard leggur frá sær

Frá 1. desember 2002 er eingin Kjartan Dalsgaard at hoyra í Tryggingarfelagnum, hvørki í telefonini, ei heldur »fysiskt«. Síðsti arbeiðsdagur hansara var 30. november.

35 ár vóru tá liðin, síðani Kjartan saðlaði um og varð tryggingarmaður og 35 áramálsdagin valdi hann at gevast. Kjartan byrjaði sum tryggingarumboð fyri Føroya Lívstrygging 1. desember 1967, hevði sína egnu umboðsstovu, nógvu árini á Hoyvíksvegnum, í KFUM-húsinum og seinni í húsunum hjá Heina í Kjøt. Seinni í Quillingsgarði, høvuðssæti hjá Føroya Lívstrygging – og eftir umskipanina var hann partur av Tryggingar-felagnum Føroyar.

Eldsálin Kjartan var sýnisgluggin, sølumaðurin – og í nýskipaða Tryggingarfelagnum hann, sum alt visti um trygging.

Tað kom eisini til sjóndar á fráfaringarhaldinum á Kongabrúnni fríggjadagin 30. november. Vóru vóru komin at siga Kjartani farvæl.

Nestor á skrivstovuni Elinborg Johannesen, hevur starvast á Kongabrúnni síðani 1959, segði í røðu síni, at Kjartan fór at verða saknaður, »eg tori at siga, at vit øll hava havt okkurt við teg at gera, hevur tú við tíni breiðu vitan innan tryggingar altíð verið góður við ráðum og givið tær stundir til okkum, tá heitt hevur verið á teg«.

Á myndini síggja vit Kjartan saman við »fostbrøðrum«, KFUM-skótaovastarnir Trúgvi Sigurðson, Klaksvík og Palli Mortensen av Argjum, sum eisini vóru komnir at heiðra Kjartan, nú hann legði kongin.

---

# Ær á brundi

SEYÐAHALD
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Meðan kjøtið hongur ræst í hjallinum, og bøgirnir á teim hagagóðu krovunum hava fingið átiliga grønliga litin, fyrireikar náttúrar seg til næsta skurð. Brundseyðirnir eru nú sleptir út og teir hava úr at gera næstu vikurnar.

Myndin sýnir ein veðragjólving á Norðtoftum í Hvannasundi seinasta hósdag. Hann var júst útsloppin og var sera ágrýtin. Men ærnar vóru ikki tilreiðar enn og lítið kom burturúr.

Tað sæst, tá ein ær er á brundi. Hon tveitir høvdið aftur við síðuni og letir við halanum, næstan sum lomb, tá tey súgva. Og hvussu skjótt brundingin gongur fyri seg er ymiskt. Skjótast gongur við teim eldru óðnum. Tá er brundurin sjálvdan longur enn tríggjar tímar hjá henni.



*Ein verðagjólvingur roynir seg á Norðtoftum syðst á vestursíðuni í Hvannasundi*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Við teim yngru gongur drúgvari tíð.

Fyrr vóru veðragjólvingar flettir, tá teir vórðu tiknir inn aftur í januar. Tá hevði mann ikki hoyggj til veðragjólvingar, hoyggið fór í neytini. Tað varð ikki hildið at verða nakað serligt slakt í verðagjólvinum. Høvdu teir verið til nakra nyttu, so vóru teir diddarak. Men áðrenn fyrstikassin kom, var forkunnugt við feskum, og tí smakkaði eisini tað sindrið, sum var á einum verðagjólvingi væl.



# Barnaleikur á Meiarínum

**Ber tað til at gera sjónleik burtur úr ongum? Tveir sjónleikarar hava bert eitt kuffert við sær, tá teir fara á pallin á Leikhúsinum Grímu hósdagin og leygardagin við ævintýrleikinum »Risans Hjarta«**

Leikurin snýr seg um ein fátækan drong og eina bóndadóttur, sum hava verið góð síðan tey vóru smá, hóast bóndanum ikki dámar at tey spæla saman. Men tá Risin av Gráfjalli tekur gentuna, og rýmir við henni, avger drongurin at fara at bjarga henni. Nógv løgið hendir honum á vegnum, áðrenn hann kemur vegin fram til Gráfjall, og finnur gentuna. Men hvussu skulu tey fáa lívið av risanum, tá hann onki hjarta hevur í kroppinum?

Gunnvá Zachariasen og Hans Tórgarð hava gjørt leikin, og tey spæla sjálvi bæði børnini og risan, bóndan og allar hinar verurnar, ið koma fyri í leikinum – uttan hjálp av ljósið, ljóði, búnum ella kulissum!



Eitt kuffert við ymsum løgnum í, er tað einasta tey hava við sær á pallin, so hugflogi sleppur at standa sína roynd, bæði hjá leikarunum og áskoðarunum.

Tey hava spælt nú í knappar tvær vikur fyri barnagørðum og frítíðarskúlum, og hevur leikurin verið sera væl umtóktir millum bæði børn og vaksin. Øll børn ganga ikki í barnagarð, so tí hevur Gríma nú sett tvær almennar sýningar á skránna, hósdagin kl. 17.00 og leygardagin kl. 15.00. Er áhugin stórur verða kanska fleiri sýningar.

Leikurin er serliga væl egnaður til børn frá 3 til 10 ár, men annars eru allar barnsligar sálir vælkomnar oman á Meiaríið til ein knappan tíma, har hugflogið verður sett í sentrum.



